# Spennandi val í Sunda Kommunu

**Einki briksl og eingi gylt lyfti vóru at hoyra á veljarafundinum í Eydnuni á Oyrarbakka fríggjakvøldið. Tað merktist, at valevnini tóku nýggju avbjóðingina, nú kommurnar verða lagdar saman, í djúpasta álvara. Valevnini vóru konstruktiv í sínum framløgum, og sum ein reyður tráður á fundinum vóru orðini samansjóðing og tryggleiki at hoyra**

KOMMUNUVAL
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*


*Hvør av hesum fer at stýra nýggju Sunda Kommununi? Av teimum seks borgarstjórunum, sum sita í verandi kommunum, stilla fimm uppaftur.F.v. Lars Gunnar Dahl Olsen, Árni Dam, Jógvan Mørkøre, Sofus D. Johannensen og Heðin Zachariasen*

Tað er lagt upp til eitt serstakliga spennandi val í Sunda Kommunu, nú kommurnar leggja saman. Av teimum borgarstjórum, sum sita við ræði í verandi kommunum, stilla fimm upp til bygdaráðið í nýggju felagskommununi.

Spenningurin upp undir valið sást eisini aftur í stóru fjøldini, um 250 fólk, sum vóru komin í Eydnuna á Oyrarbakka at hoyra, hvat valevnini høvdu at bjóða uppá.

Øll valevnini vóru samd um, at í nýggju felagskommuni, skuldu allir borgararnir hava somu sømdir.

Lars Gunnar Dahl Olsen, borgarstjóri í Saksun, tosaði um samferðsluviðurskiftini og vísti á, at eitt gott busssamband er neyðugt, fyri at allir borgararnir í kommununi skulu kunna hava somu møguleikar.

Jógvan Mørkøre, borgarstjóri í Hósvík, segði, at nýggi kommunubygnaðurin er leiðin, sum skal føra fram til nútíðarsamfelagið. Sofus D. Johannensen, borgarstjóri við Gjógv, segði, at hann onga løtu ivast í, at kommunurnar saman hava stórar møguleikar, men at tað krevur politikarar, sum hava hug og evnir at samansjóða allar bygdirnar.

Árni Dam, borgarstjóri í verandi Sunda Kommunu, kom í seinna innleggi sínum við eini sterkari appel til tey ungu:

"Trúgvið upp á tykkum sjálvi og tykkara hugskot! So leingi tit hava heilsuna, kunnu tit alt. Góðtakið ikki altíð eitt nei, og havi sjálvsálit og tað áræði, ið skal til. Hesin hugburður hevur ført heimin frameftir og kemur eisini at føra hetta økið fram, bæði vinnuliga, ítróttarliga og á annan hátt."

Heðin Zachariasen, borgarstjóri í Hvalvíkar kommunu, legði dent á, at tað er sera umráðandi, at allir borgarar í øllum bygdunum kunnu siga, at Sunda kommuna er teirra kommuna, og at her er gott at búgva, gott at arbeiða og gott at njóta sína framtíð.

### Hvussu skulu vit liva

Hvussu skulu vit liva, tá vit koma saman, spurdi øskudólgur sópunarkonuna.

Og tað vóru eisini spurningar sum slíkir, ið komu mest fram á fundinum.

Tað, sum heslt hevði størstan áhuga millum fundarfólkið, var skúli og mentan. Men eisini ferðslutrygdin var nógv við í orðaskiftinum.

Gjøgnum tær 12 bygdirnar, sum nú leggja saman, ganga nógvir kilometrar av landsvegi, sum í fleiri støðum als ikki er nóg tryggur at ferðast eftir. Í ti sambandinum høvdu fundarfólkini fleiri spurningar, og tað var týðiligt, at hetta er nakað, sum upptekur fólkið í økinum nógv.

Veljarafundurin á Oyrarbakka var bæði góður og siðiligur - og hvat kundi tú vænta annað, tá sjálvur løgtingsformaðurin, Edmund Joensen, varð settur at stýra fundinum.

Hesar 12 bygdirnar í teimum seks verandi kommununum, leggja nú saman í eina, sum fær navnið, Sunda Kommuna. Í bygdunum búgva góð 1500 fólk, harav smá 1100 hava atkvøðurætt til valið hesaferð. 37 valevni bjóða seg fram at stýra nýggju kommununi komandi 4 árini

Hósvík
Hvalvík
Streymnes
Saksun
Nesvík
Langasandur
Haldórsvík
Tjørnuvík
Oyri
Oyrarbakki
Norðskáli
Gjógv

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag


Vika 46, 2004
www.kaupthing.fo

# Framgongd í USA stimbrar

MARKNAÐARRÁK

Serliga tvær hendingar ávirkaðu fíggjarmarknaðirnar í farnu viku: amerikanska forsetavalið og arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin fyri oktobur. Forsetavalið var javnt, men tað sum hevði størstan týdning fyri marknaðirnar var, at greiða fekst á úrslitinum skjótast gjørligt. Bush vann, og partabrøvini hækkaðu. Lánsbrævarenturnar ávirkaðust ikki stórvegis av valinum.

Tíðindini frá arbeiðsmarknaðinum í USA gjørdust sera bjørt. Í oktobur komu heili 337.000 nýggj størv móti teimum væntaðu 175.000. Haraftrat vórðu tølini fyri septembur og august hækkaði munandi. Tríggjar teir síðstu mánaðirnar eru sostatt komin í miðal 224.000 nýggj størv, og tað er eitt gott tekin um, at búskaparvøksturin er væl grundaður. Eisini tímalønin vaks meira enn væntað, so amerikanski brúkarin hevur fingið meiri pening um hendi. Hetta stuðlar alt metingini hjá Kaupthing um, at amerikanski búskapurin hevur tað gott, og at lánsbrævarenturnar tessvegna so líðandi fara at halda áfram at hækka.

Oljuprísurin, sum hesar seinastu mánaðirnar mestsum fullkomiliga hevur stýrt lánsbrævamarknaðinum, lækkaði í vikuni. Bæði orsakað av, at valið varð so skjótt avgreitt, men mest orsakað av, at amerikansku oljugoymslurnar vuksu væl meir enn væntað í farnu viku.

Hendan vikan verður meira friðarlig hvat lyklatølum viðvíkir. Í USA fer tjóðbankin væntandi at hækka rentuna í 2,0% mikudagin. Tað mest áhugaverda verður tó tíðindaskrivið frá fundinum. Haraftrat koma tøl fyri smásøluna. Í Evropa kemur BTÚ fyri 3. ársfjórðing fríggjadagin. Hóast alt metir Kaupthing, at góða arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin í farnu viku fer at hava varðandi týdning fyri fíggjarmarknaðirnar komandi dagarnar.

Higartil hava útvið 80% av virkjunum í USA kunngjørt roknskap, sum hava verið ájavnt ella betur enn væntað. Hesa vikuna kunngera m.a. virkini Cisco og Dell, og Kaupthing væntar, at teirra úrslit verður ájavnt heildargongdini. Nú tað samstundis sær bjartari sær út í búskapinum í USA, væntar Kaupthing, at partabrævamarknaðirnir kunnu standa seg væl í næstum.

**Rentur**

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,49% | 0,08% |
| 5 ára lánsbræv | 3,34% | 0,07% |
| 10 ára lánsbræv | 4,20% | 0,04% |

**Partabrævavísitøl**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 279,9 | 1,8% |
| OMX, Svøriki | 724,9 | 1,9% |
| Eurostoxx 50, Evropa | 2.870,9 | 1,3% |
| S&P 500, USA | 1.166,2 | 3,2% |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 105,65 | -0,1% |
| Evru Lánsbrøv | 169,29 | 0,1% |
| Norrøn Partabrøv | 84,75 | 2,6% |
| Altjóða Vøkstur | 58,33 | 1,4% |

**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 573,73 | -1,6% |
| EUR | 743,27 | 0,0% |
| GBP | 1.065,29 | -0,3% |
| NOK | 90,81 | -0,3% |

*Renta og kursir kl 10 ígjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*



# Lítið valtos í Vágum

**Tað tykist næstan, sum tað ikki er gingið upp fyri fólki í Vágum, at kommunuval er týsdagin. Ikki ein valplakat er at síggja nakrastaðni, og ógvuliga lítið verður tosað um val**

KOMMUNUVAL
*Edvard Joensen*


*Í Undirhúsinum í Miðvági gongur prátið vanliga lívliga. Men kommunuvalið verður ikki nógv tosað um*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Vágar:** Tað er spakt valrák í Vágum. Mestsum kyrrindi. Tykist mestsum, at fólk hava ikki fatað, at kommunuval er týsdagin, og at tey, sum skulu stýra bygdunum næstu fýra árini, tá skulu kjósast.

Í Sørvági hevur ein veljarafundur verið, og har møtti væl av fólki. Men fundurin var heldur spakur, halda fleiri sørvingar, Sosialurin hevur fingið orð á eftir fundin.

Flest øll uppstillaðu valevnini vóru á fundinum, men einki serligt sprell var í kortini, siga keldur okkara.

Av valagitatión annars er lítið at frætta, siga sørvingar. Eingin plakat er at síggja nakrastaðni, og bert onkur hendinga faldari verður borin út soleiðis hissini.

Treyðugt so. Tosað verður okkurt her og har, sum fólk hittast. Men tað er ikki meira enn vanligt er, tá soleiðis er. Eingin serligur valstemningur, halda tey í vestastu kommununi, sum verður í landinum eftir nýggjár.

Heldur ikki hinumegin er nakað serligt veiggj í valtosinum. Tað er tað sama. Onkur hendinga faldari og SMS. Men ongar plakatir. Og veljarfundir hava ikki verið heldur. Hvørki í Miðvági ella Sandavági.

Kvinnubólkurin í Vágum skipaði í farnu viku fyri einum forvitnisligum fundi um kommunusamanlegging sum so. Men tað hevði ikki beinleiðis tilknýti til aktuella valið.

### Sama tosið

Í undirhúsinum í Miðvági er tosið tað sama, sum tað vanliga er. Fiskur, regn, harur og okkurt lítið um fótbólt.

Men kommunuvalinum ganga tey stillisliga um hurðarnar við. Einki lív er í, verður sagt í undirhúsinum. Fólk munnu halda væl standa til, tí er so lítið at hoyra.

Tó er kortini ein listi gjørdur í Miðvági, har eingin av verandi bygdarráðslimunum er á. Har eru onkrir útróðrarmenn uppstillaðir, og sum undirhúslimirnir í Miðvági vita at siga frá, tykist høvuðsmálið við at gera tann listan vera, at fáa víðkað bátahylin ella kanska gera ein nýggjan, tí har er við at treingjast.

Miðvágs- og Sandavágs kommunur samstarva um havnina, og tískil eru eisini bátar úr báðum bygdunum í bátahylinum í Miðvági.

Onkur broyting í samansetingini verður kortini, vita tey í undirhúsinum. Tí í hvussu er tvær av kvinnunum, sum hava sitið í bygdarráðnum nøkur valskeið, stilla ikki uppaftur.

Men annars er lítið at frætta um, hvat tey, ið stilla upp, ætla sær at geva miðvingum komandi fýra árini, siga tey í undirhúsinum í Miðvági.

### Næstan deytt

Í Sandavági er næstan deytt. So galið, at summi fólk vita ikki, hvør upstillaður er, hóast tað hevur verið kunngjørt bæði í pressuni og við uppsløgum.

Og tey, sum eru á teimum báðum listunum, hava heldur ikki gjørt tað øgiliga stóra við at gera seg kend millum veljararnar í bygdini.

Sunnukvøldið gekk eitt einstakt valevni í yngra endanum og pikkaði spakuliga á dyrnar hjá sandavágsfólki og býtti ein faldara út við yvirliti yvir mál, sum viðkomandi vil hava framd í komandi valskeiði. Onkur er farin at nýta tøknina so sum SMS og okkurt hendinga teldubræv.

Men vágafólk, sum Sosialurin hevur tosað við, siga, at tey ætla sær á val. Hvussu tey fara at velja, eru tað fá, sum vilja siga alment. Men eitt rættiliga ofta afturvendandi svar er spurningurin:

*»Man tað ikki fara at verða tað sama?«*

Í hvussu er tykjast tað vera ógvuliga fá vágafólk, sum hava gjørt sær eina greiða meingin um, hvør skal sita í borgarstjórasessunum í teimum trimum kommununum í oynni eftir nýggjár.

# Nýtt fótbóltsfelag í Vágum

**Fundur til stovnan av nýggjum fótbóltsfelag í Vágum skuldi vera á Giljanesi mánakvøldið. Ætlanin er at stovna felag, sum skal taka við eftir FS Vágar samtakið, sum er hildið uppat. Nýggja felagið skal eita FS Vágar**

FÓTBÓLTSFELAG
*Edvard Joensen*


*Nýggja fótbóltsfelagið í Vágum fer at eita FS Vágar og skal ætlandi luttaka í aðru mansdeild og í kvinnudeildunum komandi kappingarár*

**Vágar:** Vágafólk ætla framhaldandi at vera við í fótbóltskappingini undir heitinum FS Vágar. Sjálvstøðugt felag við hesum navninum verður nú stovnað, og skal felagið ætlandi taka við spæliloyvinum í aðru mansdeild og kvinnudeildunum.

Tað eru fyrrverandi FS stuðlar, sum hava tikið stig til at stovna nýggja felagið, eftir at samstarvið, sum fyrr var millum fleøgini í Vágum um fótbóltin, er burturdottið.

Háost endalig loysn ikki er fingin á aktuella málinum um rættin at spæla í aðru deild, tykjast teir, sum nú hava tikið stig til nýgjga felagið, sannførdir um, at teir fáa spæliloyvi og sleppa at luttaka í aðru deild komandi kappingarár.

Stigtakararnir siga, at teir síggja fyri sær eitt fótbóltssamstarv í Vágum og á vestursíðuni á Streymoynni, sum kortini fer at eita FS Vágar.

Seinnu árini hava eitt nú vestmanna- og kvívíksdreingir leikt fótbólt við liðum úr Vágum, og er tað hetta smastarv, teir nú ynskja at menna, siga teir.

Stigtakararnir siga í tíðindaskrivi, at á fundinum fara teir at leggja fram uppskot til reglugerð, nevndarlimir og virksemi felagsins í nærmastu framtíð. Lagt verður upp til, at tey, ið møta á fundinum, skulu koma til orðanna og fáa gjørt sína ávirkan galdandi á nýggju byrjanina til samstarv um fótbóltin í økinum.